## DAGSINS MEINING

# Hastverk er lastverk

Tað eru meira tvær vikur síðani ræðuligu atsóknirnar móti ósekum menniskjum í USA og enn hevur USA saman við tess sameindu ikki fyritikið sær annað enn at kanna málið til botns. Roynt verður at finna tey seku. Hetta er eingin løtt uppgáva, men stórur partur av heiminum stuðlar USA í hesum so neyðuga arbeiði. Spurningurin er bara, hvussu nógv prógv eru funnin í málinum. Hóast úttalilsi um kríggj og revsing, so tykist leiðlsan í USA at hava livað upp til skilagóða orðatakið, “at hastverk er lastverk”. Hóast tað stendur nógv á amerikanska forsetanum og næstu monnum hansara alt fyri eitt at fremja atsóknir móti teimum, sum hava staðið aftan fyri atsóknunum í New York og Washington, so tykjast hesi at hava tacklað málið skilagott. Tað sýnist sum linjan hjá heldur hóvliga uttanríkisráðharranum í hvussu er fyribils hevur vunnið á heldur avgjørdu og víðgongdu linjuni hjá verjumálaráðharranum. Og tað fegnast vit um. Ikki tí – USA hevur sín fulla rætt til og eigur at finna tey seku aftan fyri meira enn 6000 morð umframt ta altumfatandi oyðilegging hesi hava framt. Higartil hevur øll orka verður løgd í kanningar og diplomati, men samtíðis er greitt, at USA ger klárt til kríggj móti yvirgangsmonnum og teimum stjórnum, ið stuðla slíkar.

Tað skal vera vón okkara, at USA ikki leypir framav. At henda heimsins mest múgvandi tjóð brúkar alla sína orku til at leita fram prógv, ið veruliga sýna, hvørji yvirgangsfólkini eru og hvør stuðlar teimum. Tess fleiri prógv, tess størri stuðul vil USA fáa frá altjóða samfelagnum, tá tað fer eftir teimum seku.

Tað ber altíð til í slíkari støðu sum hesari at finna ella finna uppá orsøkir til, at yvirgangsmenn fremja slíkt. T.d. tann at hevði USA rikið annan politikk mótvegis muslimsku londunum heldur enn at halda lív í korruptum stjórnum, so hevði verðin sæð øðrvísi út. Tað er greitt, at hetta eru sjónarmið, ið eiga at takast við í tað orðaskifti, sum kemur í kjalarvørrinum á terroratsóknunum. Men lat tað tó vera púra greitt, at mistøk, sum USA ger í tess politikki í t.d. Miðeystri legitimera ikki slíkan yvirgang. Tí má og skal hann køvast. Einki kann rættvísgera slíkan yvirgang. Men nú hann er hendur er sjálvandi rætt og neyðugt at seta fokus á nettupp fleiri av teimum spurningum, sum ikki minst hóvligu muslimarnir royna at gera vesturheimin varugan við. Vilja vit ikki brúka meira tíð og orku til at skilja støðuna hjá vanliga fólkinum í muslimskum londum, eitt nú palestinum, so elvir tað bara til, at tey víðgongdu, tey fanatisku, ja religiøsir fundamentalistar vinna fram.

Latið okkum stuðla USA í hesum døgum við m.a. virkin at luttaka í einum breiðum og mennandi dialogi, hvussu vit í felag gera henda heim betri at liva í hjá øllum fólkum uttan mun til religión, húðalit oa. Heldur enn at fara í kríggj eigur Vesturheimurin at fremja semjusøkjandi politikk mótvegis hóvligum og demokratiskum kreftum kring heimin, her ikki minst í muslimska heiminum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lumpan og lirkan

**Sagt av einum kendum tjóðveldismanni**

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Hetta heiti mugu teir ráðandi í verandi samgongu fáa, tí starvslýsingarnar í bløðunum í dag 26. september 2001 kunnu ikki verða meira avdúkandi viðvíkjandi, at siga eitt, men meina nakað heilt annað, fyri at tøla (lumpa) útjaðaran.

**Størv í kolvetnisumsitingi eru leys at søkja:**
Í Klaksvík, leiðari við útbúgving frá hægri lærustovni til deildina, sum skal skipa fyri hvørjir aðrir partar skulu liggja í Suðuroy.

Eg meini tað.

Í Klaksvík, tveir løgfrøðingar cand.jur og tveimun roknskaparfrøðingum.

Í Suðuroy, tvey størv har viðkomandi skal hava skrivstovuútbúgving, verða arbeiðssom og eru arbeiðsuppgávurnar m.a.: barsilsskipanin, fríðtíðarløn og frítíðargrunnur, arbeiðsmarknaðareftirlønar grunnur og allernådigst skráseting av persónstølum í samband við oljuvinnuna.

At hetta kemur undir yvirskriftina kolvetnismál, kann bert verða fyri at tøla suðringar.

Við slíkum framferðarhátti er ógvuliga ilt at fáa eyga á økismenningina, sum samgongan tosar um, men lítið ger við og harafturat ber til at siga, at ávísir politikarar mugu kallast orðloysingar um hatta er at deila størvini millum Klaksvík og Suðuroy.

Livst so spyrst.

# Pláss skal vera fyri øllum

**Viðmerkingar til samrøðu við Jenis av Rana í Sosialinum týsdagin 18/09**

**Signar í Homrum**
*Gøteborg*



Góði Jenis. Aftaná at hava lisið samrøðuna við teg, um yvirgangin í New York,og muslimar, í Sosialinum týsdagin, helt eg at eg ikki kundi lata verða við at gera nakrar viðmerkingar til orð tíni. Eg vóni at blaðmaðurin hevur miskilt tíni orð, og at greinin ikki er støða tín.

Tú sigur, at ”...tað er blint hatur, ið fær fólk at gera slíkt...” Fyrsta viðmerking: Tað er blind fanatisma, ið fær fólk at gera slíkt.

Tú sigur, at ”...týskari var dømdur hálvt ára fongsul, fyri at hava blakað grót móti løgregluni í Svøríki...” Onnur viðmerking: Eg eri sjálvur búsitandi í Gøteborg, har ES fundurin var, og fekk sjálvandi nógv við av rokinum. Tað, maðurin og fleiri onnur eru dømd fyri, er yvirgang móti yvirvaldinum. Her hevur tú nokk misskilt okkurt, tá tú líknar støðuna við Palestina. Gøteborg er jú ikki týskur býur, hersettur av svium. Har er stórur munur á...

Tú sigur, at ”...teirra skriftir læra tey, at tey skulu drepa fyri sína trúgv...” Triðja viðmerking: Eg eri ikki so væl lærdur innan skriftirnar, men gjørdi mær tann ómakin at kanna, júst hvat Koranin sigur um hetta. Tað sum Koranin sigur er, at verða Islams fólk forfylgd fyri sína trúgv, hava aðrir muslimar skylda at leggja uppí, soleiðis at tað er liviligt fyri øll fólk, óansæð trúgv. Tvs. tey skulu ikki drepa frá hond, uttan steðga harðskapi...

So ansa eftir, ikki at skýra eina heila trúgv, fyri tað sum nøkur fá gera. Tað er sum at siga, at tað sum hendi í Waco í Texas, at tað er soleiðis øll kristin bera seg at.

Síðst í greinini sigur tú, at _... USA gongur á odda fyri fólkavaldinum...” Eg havi bert hug at siga: ”Minnist tú Salvador Allende ?” Og øll hini, har USA, við hjálp av CIA og øðrum steðgaði fólkavaldinum, tí teir vóru bangnir fyri fólkavaldu vinstrafólkunum. Nei, USA tænir ikki bara fólkavaldinum, men eisini egnum áhugamálum.

Sum eina síðstu viðmerking til samrøðuna við teg, havi eg hug at nevna, at greinin í Sosialinum týsdagin 18/09, hevði í Svøríki verið skýrd ”Hetz mot Folkgrupp”. Hetta er ein serlig lóg, sum er gjørd aftaná nýnazistarnir eru farnir at gera um seg. Lógin heimilar lógvaldinum, at leggja uppí, og døma fongsulsrevsing til fólk, ið mæla til hatur ella andstygd fyri øðrum fólki ella trúarbólkum. Og so ikki at gloyma Yvirlýsingina hjá ST um mannarættindi, sum tú kanska átti at lisið...

**Yvirgangur kann aldrin góðtakast**

Nú haldi eg, at eg skal leggja doyðin á, at eg eri ímóti yvirgangi av øllum slag, líkamikið hvør tað er sum fremur hann. Men sum eitt slag av samanbering við yvirgangin í USA, vil eg taka upp nakað sum hendi fyri 19 árum síðani:

Tann 16 september 1982 lupu ísraelskar falangistdeildir á flóttarfólkalegurnar Sabra og Shatila, og byrjaðu eitt trídaga langt blóðbað við neyðtøkum, yvirgangi og morði. Hesar tríggjar dagarnar lótu 1.800 fólk lív. Tey flesu civil. (Eftir orðabókini hjá Jóannesi av Skarði merkir hetta borgarar, fólk sum ikki ganga í hermannabúna). Hetta gjørdi eisini at Ísrael hersetti Libanon, sum aftur kostaði 17.500 fólkum lívið. (Sambært grein hjá Robert Fisk í The Independent)

Hetta er okkurt um 3 ferðir so nógv, sum doyðu í World Trade Center og Pentagon, men eg havi ikki hoyrt nakað um livandi ljós og minnisløtur fyri hesi fólk. Ikki heldur havi eg hoyrt nakað um, at tann

*Framhald á síðu 9*

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 8*

sum verður sagdur at hava ábyrgdina av hesum, nevniliga Ariel Sharon, skal stevnast inn fyri rættin í Haag fyri hesi brottsverk, hóast at nógv fólk hava kravt tað. Tað er, sum onkur hevur sagt, at tað er vinnarin ið skrivar søguna... Hetta skal ikki heldur skiljast sum um, at eg haldi at ”USA er fanin”, men heldur sum ein kontrast til tað sum júst er farið fram. Og hevur USA tikið uppá seg leiklutin sum heimsløgregla, ja, so verða teir í stórum vanda sum mál tíverri.

Nei, hvørki kríggj ella yvirgangur loysir nakran trupulleika. Tað vit menniskju mugu læra, er at tosa um tær ósemjur, ið eru okkara millum. Alt annað elvir bara til meira harðskap. Og kalla vit okkum eitt framkomið samfelag, mugu vit verða hevjaði yvir hevnd. Tað sum umræður, er at verja samfelagið, við øllum tess borgarum, trúgvum og liviháttum móti ágangi. Nógv verður tosað um kríggj móti bin Laden og Afghanistan. Men hetta, ífylgi Robert Fisk, hevði verið at fylgt mynstrinum hjá bin Laden. Hansara ynski er, at draga alt miðeystur í kríggj móti USA og Ísrael. Og leypur USA á, so kanska tað eydnast

**Rættvísi, umsíðir**

Einaferð var tað ein yvirgangsmaður, sum kallaður varð Sjakalurin. Aftaná sekstan ár bleiv hann handtikin í Sudan, av fronskum trygdartænastumonnum. Ikki eitt fólk læt lív, fyri at fáa hendan mann fyri rættin. Hann situr í dag í Santéfongslinum í Fraklandi. Onkur legði eina bumbu í eitt flogfar í Bretlandi. Flogfarið sprongdist, og datt niður yvir eina skotska bygd, og nógv fólk lótu lív. Aftaná tólv ár við tingingum, vórðu fólk sett til svars fyri hetta.

Tað sama fer at henda við Osama bin Laden. Fyrr ella seinni kemur maðurin at standa til svars fyri leiklut sín í altjóða yvirgangsvirksemi. Men tað tekur tíð, áðrenn hetta verður veruleiki. Men tað verður veruleiki. Fortíðin fær ein altíð aftur. Og tá fellir hamarin...

Tað, eg royni at siga, er, at líkamikið trúgv og livihátt, hava vit øll skyldu til at ansa eftir hvørjum øðrum, og ikki royna at kroysta okkara sannføring yvir onnur. Vit hava skyldu at skapa eitt samfelag, har pláss er fyri øllum. Og trupuleikarnar loysir tú ikki við kríggi...

Δ

# Landsfundurin hjá Javnaðarflokkinum 14.–15. september í Vestmanna

**Jóhan F. Magnussen**

Her kom fram ein boðskapur, sum greitt boðar frá, hvat Javnaðarflokkurin stendur fyri, og sum øll Føroya fólk kunnu taka undir við.

Tað, sum er komið fram um pensjónina og lønina hjá løgtings- og landsstýrismonnum, er ikki nakað, sum javnaðarfólk standa aftanfyri. At løgtings- og landsstýrismenn fáa eina sømiliga løn, er eingin ímóti, men vit skulu heldur ikki koma aftur í fimti árini, tá tað bara vóru tey fastløntu, og tey, sum høvdu fleiri størv, sum stillaðu upp. Jú, teir skulu hava eina sámiliga løn og sømiliga pensjón.

Tað skal heldur ikki verða so, at pensjonistar skulu hava so stóra pensjón, at teir fara upp um arbeiðarastættina. Arbeiðarastættin fær heldur ikki ov nógv; vit mugu ikki fara av kós her.

Javnaðarflokkurin skal halda seg til sína stevnuskrá og vera ein arbeiðaraflokkur. Fullveldis paradísið hjá Høgna Hoydal, sum so nógv hevur verið frammi, er á eina heilt skeivari kós, tað hongur ikki saman fíggjarliga, tí teir vilja offra Føroya fólk fyri fullveldinum. Høgni Hoydal kemur við teimum røttu orðunum, at fólkið verður fryst inni av hesum fullveldisloysnini, sum hann hevur lagt fram.

Javnaðarflokkurin hevur ongantíð verið ein loysingarflokkur, sum Tjóðveldisflokkurin ger hann til, og tað vænti eg, at heldur ikki so verður, men at arbeiða fram ímóti einum fullveldi, er rætt, og minka blokkin til tað, sum samfelagið tolir, men tað skal ikki ganga útyvir vælferðina í landi okkara.

Vit hava tað gott í hesum landi og skulu verja tað, sum vit hava.

Tit, sum ivast nú, hvar Javnaðarflokkurin stendur, hava fingið at vita henda greiða boðskapin, at kemur Javnaðarflokkurin fram at, so skulu nýggjar forhandlingar fram um blokkin. Blokkurin skal ikki skerast meira niður, enn tað er forsvarligt fyri vælferðina í landi okkara. Javnaðarflokkurin sær vandan í, at blokkurin verður skorin fýrahundrað miljónir, samtíðis sum tað skal brúkast ein rúgva av peningi til sjúkrahúsverkið, strandferðsluna, politiið, kirkjuna, sum nú ikki skal vera ein fólkakirkja, so handa roknimaskinan hjá Karsten Hansen og Bjarna Djurholm, verður søgulig.

Eg vóni, at fólk vakna úr svøvni, nú tað standa val fyri stavn, og sær vandan.

# Løgmaður groggy av veljarakanningini

**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Høvuðsgreinin hjá Sosialinum í fyrsta blaðnum eftir veljarakanningina var eitt viðtal við løgmann í hansara fjákutu mistonkiliggerðing av veljarakanningini.

Eg havi í aðrari grein víst á, at illa ber til í eini veljarakanning at síggja størri samsvar millum ymiskar spurningar, ið sum sonevndir kross-spurningar skulu lýsa støðutakanina hjá fólki til eitt ávíst mál — í hesum føri ríkisrættarligu støðuna. So tað skal eg ikki gera meira burtur úr her, men lata lesaran sjálvan døma.

Samgongumeirilutin gjørdi sum kunnugt ein løgtingssamtykt í vár um fullveldisætlanina hjá landsstýrinum. Fjórði spurningur í veljarakanningini snýr seg um hetta og ljóðar:

4. ”Í apríl samtykti løgtingið eina fullveldisætlan. Henda miðjar ímóti at yvirtaka málsøki fram til 2012, skerja blokkstuðulin 350 mió. kr. frá árskiftinum, og stovna ein búskapargrunn, sum skal tryggja eina skiftistíð fram til 2016. Taka tygum undir við hesi samtykt?”

Spurningurin kann ikki verða meira beinrakin um fullveldisætlanina hjá landsstýrinum. Henda spurningin skulu fólk at svara uppá, uttan at tey vita nakað um, at tað kemur ein annar spurningur aftaná av nøkulunda sama slag.

Og svarið er klokkureint: 38% siga Ja og 53% siga Nei. Altso, í stórum, greiðum meiriluta venda fólk sær frá fullveldisætlanini. Hetta er tann trupulleikin hjá landsstýrinum, sum hvørki løgmaður ella varakunnu vrøvla seg burturúr.

Aftaná at fólk hava svarað spurningi 4, fáa tey spurning 5, og har er støðan líka greið:

5. ”Sum alternativ hevur verið borið upp á mál eitt víðkað sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin og undir danskari grundlóg. Er tað møguleiki tygum kunnu ganga inn fyri?”

Svarið er her eins greitt og til spurning 4: 54% siga Ja og 35% siga Nei. Mótvegis møsninum hjá løgmanni og vara- er hesin spurningur eins greiður og svarið.

Legg til merkis, at spurningurin byrjar við orðunum: ”Sum alternativ”. Smb. donsk-føroysku orðabókini merkir ”alternativ”: ”val millum tvey”, ”annar av tveimum”, ”annaðhvørt”. Sjálvandi vita fólk hvat hetta merkir, nevnliga antin hetta ella hatta, antin fullveldisætlanina hjá landsstýrinum ella víðkað sjálvstýri í ríkisfelagsskapinum. Men løgmaður vil altso vera við, at veljararnar, serliga fólkafloksveljararnar, ikki skilja hvat ”Alternativ” merkir, og taka tað sum bæði hetta og hatta. Her haldi eg álvaratos, at tað eru ikki veljararnir, men løgmaður, sum er í ørviti.

Síðani eru vælkend hugtøk í spurninginum, sum eg rokni við at flestøll ikki eru í minsta iva um, hvat tey merkja - kanska undantikið løgmaður og vara-.

Men løgmaður vil altso vera við, at ”fólk hava stutt sagt ikki vitað, hvat tey hava svara uppá”. Og hann tekur tað uppaftur, enn harðligari: ”Fólk hava aldeilis ikki skilt, hvat spurt varð um.” At tað hinvegin er løgmaður sjálvur, sum er groggy, skilst av einum brotið í viðtaluni í Sosialinum, har hann sigur, at ”landsstýrið arbeiðir við eini sjálvstýrislóg, sum skal bera okkum fram til endaliga fullveldið. Men tað hava fólk bara ikki skilt, tí tað hevur verið spurt ov ógreitt.”

Nei, onki arbeiðir landsstýrið við nakrari sjálvstýrislóg — landsstýrið arbeiðir eftir teirri gomlu, fúnaðu heimastýrislógini og hevur ikki annan myndugleika enn tann, sum heimastýrislógin heimilar. Hagani stava jú allir trupulleikarnir, teir klandrast við donsku stjórnina um.

Landsstýrið skuldi hinvegin heldur gjørt eftir uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum, og í staðin fyri heimastýrislógina sett eina sjálvstýrislóg, sum ber í sær, at Føroya Løgting verður hægsti myndugleiki í Føroyum, og at Føroyar verða staðfestar sum tjóð við fullum sjálvsavgerðarrætti. Henda sjálvstyrislógin skal í sáttmála staðfesta Føroyar og Danmark sum tvey sjálvstøðug og javnsett lond í ríkisfelagsskapi hvørt við annað.

Hetta er sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum. Og tað er nakað annað enn hetta ótrúliga møsnið hjá løgmanni, at ”verður tað viðtikið, verða vit limað inn í danska kongaríkið um øldir og allar ævir, og so er slutt við við nøkrum fullveldi her”. Sum maðurin segði: ”og disse regeres vi af”.

# Møtirøð við norðmanni á Glyvrum

**-Kendi norðmaðurin Johnn Hardang hevur í hesum døgum eina møtirøð í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum**

HEIMAMISSIÓNIN
*Ingrid Bjarnastein*

“Steinarnir tala” er evnið á møtirøðini, ið byrjaði í gjárkvøldið í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum. Norðmaðurin, Johnn Hardang, skal komandi dagarnar hava møtir á Glyvrum.

Johnn Hardang hevur verið bíbiluskúlalærari í Oslo og Bergen, og er tað soleiðis føroyingar kenna hann. Eisini hevur hann verið og havt møtirøðir í Føroyum fyrr. Einaferð í Tórshavn og einaferð á Glyvrum.

Fram til sunnukvøldið verður Johnn Hardang at hoyra á Glyvrum. Møtini gerandiskvøldini byrja klokkan 20.00 og seinasta møtið, ið verður sunnukvøldið, byrjar klokkan 19.00.

Fyrrverandi norski bíbliuskúlalærarin fer eisini at hava evnistímar við evninum “Berið byrðar hvør hjá øðrum 1-2”. Teir verða leygardagin og sunnudagin klokkan 16.00.

Umframt norðmannin luttaka eisini kór, og hvørt kvøld aftaná møtini borðreiða fyrireikararnir við drekkamunni. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við, og um ein ynskir tað, er eisini møguleiki fyri forbøn.